

## 200 í SvF í kvøld

Fyrr í ár spældu 200 og Lama Sea eina frálíka konsert í Gamla Meiarínum, sjónvarpið var á staðnum og tók konsertina upp, fyri nøkrum vikum síðan var konsertin við Lama Sea send, og í kvøld verður tað so 200.

Kl. 23.05 fer Føroya best umtókti rokkbólkur at buldra út í føroysku stovurnar, tað verður sum altíð harður kontantur punkrokkur við eini ferð á 200 km/t, 200 desibel hart og við 200% hjarta. Tað kann vera stoytandi, tað er argandi og ofta sera politiskt, men altíð stuttligt.

**nud**

---

## Umleggingar á Býarbókasavninum

**Telduskipanin verður løgd um, og tí verður dagliga arbeiðið á savninum órógvað komandi mánaðin**

**BÓKASAVN**
*Jákup Mørk*

Býar- og skúlabókasøvnini í Tórshavnar Komnmunu fáa í næstum nýggjar EDV-skipanir. Meðan hesar verða settar í verk, verður dagliga arbeiðið á søvnunum órógvað.

Í høvuðsheitum merkir hetta, at nakrar av vanligu funktiónunum í telduskipanini ikki rigga fullgott komandi mánaðin.

Tey, sum hava bílagt bøkur, fáa ikki boð um, at tær eru komnar, fyrr enn nýggja skipanin er farin at virka.

Upplýsingar um eintøk, sum standa í grunninum, eru ikki eftirfarandi. Nakrar av bókunum, sum standa at vera tøkar, eru kortini ikki tøkar.

Tað ber ikki til at bíleggja bøkur í bókasavnsskipanini.

At enda verðu tó sagt, at tað sjálvandi framvegis ber til at læna bøkur og at koma við fyrispurningum til bókasavnið.

---

## ES-samstarv innan útbúgving og gransking

**Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, fer í morgin á fund við ES-myndugleikar í Brússel í sambandi við, at Føroyar í næstum hava góðar møguleikar at koma við í útbúgvingar- og granskingarsamstarvið í ES**

**ES-SAMSTARV**
*tíðindaskriv*

Jógvan á Lakjuni skal í morgin á fund við ES fyri at vera við til at skunda undir, at Føroyar kunnu luttaka í øllum útbúgvingar- og granskingarprogrammunum í ES. Samstundis sum landsstýrismaðurin er í Brússel, fer hann eisini at vitja íslendsku sendistovuna har. Hetta verður m.a. gjørt fyri at seta seg enn betur inn í, hvussu íslendingar hava skipað seg og arbeiða við ES fyri at fáa sum mest burturúr samstarvinum.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at Landsstýrismaðurin hevur góðar vónir um, at tað fer at eydnast Føroyum at koma við í hesi ES programm. Og at hann sær hetta sum eitt framúrskarandi høvi at menna okkara útbúgvingar- og granskingarøki.

# Michael, Bogi og Niels døma í GBOB

**Á heimasíðuni hjá G!Music verður sagt frá, at danin Michael Callesen, sum umboðar SPOT festivalin í Århus, Bogi á Lakjuni fyrrverandi gittarleikari í Clickhaze og 200 oddamaðurni Niels Arge Galán verða dómarar í GBOB kappingini**

**GBOB**
*Niels Uni Dam*
nielsuni@sosialurin.fo

G! Music hevur fyrr kunngjørt at Danin Jeppe Nissenog norrmaðurin Kristoffer Kinden Endresen fara at døma GBOB, men nú er almannakunngjørt at triðji og seinsti útlendski dómarin er Michael Callesen, ið kemur sum umboð fyri SPOT festivalin í Århus. SPOT verður mettur, sum ein av mest týðandi sýnisgluggunum fyri nýggjar norðurlendskar bólkar. Michael hevur umframt arbeiðið við Spot, m.a. verið hugskotsmaður aftanfyri Calcutta Festivalin í Århus, eins og hann hevur verið formaður fyri landsfelagið Fajabefa, ið er landsfevnandi felagskapur í Danmark, við áleið sama endamáli og virkisøkjum sum Grót.



*Niels Arge Galán*

Michael hevur verið stjórnarlimur í Husets Musikteater/ VoxHall í Århus, eins og hann nú er limir í stjórnini fyri venjingarfelagið MONO. Michael er limur í Århus Amts Musikudvalg og arbeiðir dagliga innan fyri danska rokktónleikafelagskapin ROSA við at seta nýggjar verkætlanir í gongd.

### Tveir føroyingar

Umframt teir tríggjar útlendsku dómararnar, verða tveir føroyingar millum dómararnar, soleiðis at tað vera tilsamans 5 dómarar, sum gera av hvør ferð víðari til London at kappast um teir 100.000 dollararnar. Hesir verða Bogi á Lakjuni og Niels Arge Galán.

### Nógvar royndir

Bogi á Lakjuni er úr Fuglafirði. Hann er sambært heimasíðuni hjá G!Music meira musikalskur enn tey flestu og hevur framúr sans fyri melodium, hvat ljóðar væl og hvat riggar saman tónleikaliga. Bogi hevur m.a. vunnið Prix Føroyar kappingina í 2001

Bogi hevur drúgvar og fjølbroyttar royndir á føroyska tónleikapallinum, er av tónleikaraætt og hevur fingið tónleik í blóðið heilt frá barnsbeini av.

Bogi sang og spældi í mong ár við í Siloakórinum í Fuglafirði og hevur annars klimprast, murrað, spælt og skapt tónleik síðan smádreingjaárini. Bogi er kanska mest kendur sum framúr góði sologuitarleikarin í Clickhaze, hjá Knút H. Eysturstein og í bólkinum hjá Petur Pólsyni. Bogi spældi í sínari tíð bass grungerokkbólkinum Visible Fish, og her eins og í Clickhaze átti Bogi sín stóra part í lagaskrivingini. Bogi hevur eisini verið úti um seg á stórum pallum í Norðurlondum og hevur m.a. spælt fyri stórari fjøld Roskildefestivalunum.

Nýggjasta avrik hansara er at standa fyri framleiðsluni av nýggju og væl fagnaðu fløguni hjá Petur Pólsyni.

### Oddamaður í Føroya størsta rokkbólki

Seinasti dómarin, havnarmaðurin Niels Arge Galán er oddamaður, sangari og spælir gittar í Føroya størsta rokkbólki, 200.

Umframt at verða tónleikari, er Niels Art Director ella listarligur leiðari á Reproz. Niels hevur sjáldsama góða fatan av konseptum og eyga fyri hvat er cool, sum bólkurin 200 jú eisini er eitt talandi dømi um. Niels hevur spælt rokktónleik í nógvum bólkum, sum Oblivion, Betrayer, Mold og MC Hár. men hann hevur eisini roynt seg innan bæði jass og fólkatónleik í bólkum sum Shalder Geo og Spælimonnunum.

Umframt gittaran er Niels dugnaligur á bæði mandolin og munnharmoniku, og so var hann bassleikari og slóðbrótari í Føroya fyrsta ruskmálmsbólki Oblivion.

Nýggjasta útgávan hjá 200 er vorðin ein nýklassikkari í Føroyum og konsertin hjá 200 á G! í ár verður mett sum ein varði í føroyskari rocksøgu. 200 hava fyri stuttum síðani verið í Íslandi, har teir m.a. spældu á víðagitna Iceland Airwaves festivalinum.

---

# Sparikassagrunnurin selur partabrøv í Sparikassanum

**Føroya Sparikassi fyrireikar seg til skráseting á Virðisbrævamarknaði Føroya, og tí hevur Sparikassagrunnurin sum størsti partaeigari tikið avgerð um at selja ein part av sínum partabrøvum í Sparikassanum**

**SPARIKASSIN**

Partaeigarar í Føroya Sparikassa og onnur áhugað fáa í tíðarskeiðnum frá hósdegnum 17. november til fríggjadagin 9. desember høvi at keypa partabrøv í Sparikassanum.

Tað er Sparikassagrunnurin, ið hevur tikið avgerð um at selja ein part av sínum partabrøvum í Sparikassanum. Grunnurin eigur 93,47% av partapeningi Sparikassans, sum samanlagt er 679,311 mió. kr. Sparikassagrunnurin er tí nógv størsti partaeigarin í Føroya Sparikassa.

- Tað hevur ligið í kortunum, at Sparikassagrunnurin skal minka um sín ognarpart, soleiðis at onnur fáa høvi at ogna sær ein størri part av partabrøvunum, og nevndin heldur tað vera hóskandi at selja partabrøv nú, sigur Frithleif Olsen, formaður í nevndini fyri Sparikassagrunnin og Føroya Sparikassa.

Sparikassin hevur havt ein virknan leiklut í sambandi við stovnanina av Virðisbrævamarknaði Føroya, VMF, og longu í juni gjørdist Sparikassin limur á ICEX/VMF.

- Ætlanin hevur alla tíðina verið, at Sparikassin skal skrásetast á Virðisbrævamarknaðinum, og tað er í hesum ljósi, vit skulu síggja partabrævasølunum, ið nú byrjar, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa.

Hann vísir á, at tað er eitt krav til fyritøkur, ið vilja skrásetast á VMF, at 30 prosent av partabrøvunum eru í umfari, og hendan sølan er




*Smáu partaeigararnir í Føroya Sparikassa fáa nú høvi at keypa partabrøv í Sparikassanum frá Sparikassagrunninum, sum eigur 93,47% av partabrøvunum. Kursurin á partabrøvunum er 160*

ein liður í at røkka teimum 30 prosentunum.

Ein leistur er lagdur fyri partabrævasøluna, og hann ber í sær, at verandi partaeigarar fáa rætt til at keypa eitt partabræv fyri hvørji trý partabrøv, ið teir eiga frammanundan. Tó fáa partaeigarar í minsta lagi høvi at ogna sær 20 nýggj partabrøv við áljóðandi virði á 100 krónur hvørt. Partabrøvini verða seld til kurs 160, og tað merkir t.d., at 20 partabrøv við áljóðandi virðinum á tilsamans 2.000 krónur kosta 3.200 krónur. Harumframt kemur vanligur handilskostnaður.

Í tann mun at verandi partaeigarar ikki gera rætt sín galdandi, kunnu nýggir partaeigarar ogna sær upp til 20 nýggj partabrøv til kurs 160. Tað, sum tá er óteknað, verður selt teimum, ið ynskja at keypa fyri meira enn tillutingina omanfyri.

Harumframt fáa starvsfólk í samtaki Sparikassans høvi at ogna sær eina ávísa mongd av partabrøvunum.

Partaeigarar fáa ein av komandi døgunum bræv frá Sparikassanum um keyp av partabrøvum. Onnur áhugað kunnu venda sær til Sparikassan.